# Handilsmiðstøð aftur á breddan

**Ætlanin um at gera eina handilsmiðstøð við Sandin í Klaksvík livir enn. Eftir at hava ligið stilt í nakrar mánaðir, eru samráðingar sum skilst aftur farnar ígongd millum partarnir, sum møguliga skulu vera íleggjarar**

HANDILSMIÐSTØÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Ætlanin um at gera handilsmiðstøð í Klaksvík hevur ligið í dvala í nakrar mánaðir, men nú letur til, at gongd er komin á aftur ætlanina. Handilsmiðstøðin skal eftir ætlan liggja við Sandin, har útfyllingin til sama endamálið er um at vera liðug*

**Klaksvík:**
Tosið um handilsmiðstøðina í Klaksvík hevur ligið stilt í eina tíð nú. Men beint fyri árslok í fjør kundi Norðlýsið siga frá, at arbeiðið við ætlanini at gera eina handilsmiðstøð er so smátt farið í gongd aftur.

Arbeiðið stegðaði fullkomuliga upp seint í fjør, tá tað var greitt, at ongin fígging kundi fáast til verkætlanina, sum varð mett at liggja um 90 milliónir við miðstøðini sjálvari, parkeringskjallara, høli til Klaksvíkar Róðrarfelag, íbúðum og so framvegis. Ætlanin var øgiliga umfatandi og kostnaðarmikil og av summum skýrd at vera tann reini ørskapur. Hetta var eisini, sum skilst, tað, sum í fjør steðagði øllum upp, tí ongin vildi fíggja eina so stóra verkætlan í einum.

Men nú er tosið byrjað aftur. Júst hvat tað er, sum hevur gjørt at gongd er komin á aftur, er tó nakað ógreitt. Men sum skilst er tosið um sjálva verkætlanina broytt nakað.

Sosialurin skilir, at Klaksvíkar kommuna og stigtakararnir hava havt fund um fleiri av viðurskiftunum og krøvunum, sum vóru til upprunaætlanina, og har er so ein semja komin burturúr, sum ger, at tað aftur ber til at fara at tosa við møguligar íleggjarar.

Fyrireikararnir siga, at allur januar mánaði helst fer við at tingast við kommununa og hinar partarnar, sum eru sinnað at vera íleggjarar í verkætlanina, um hvussu ætlanin skal ella kann koma at síggja út.

### Vøksturin er í miðstøðum

Ført hevur mangan verið fram, at tað er stórt spell um handilsmiðstøðin ikki kemur, og ein av teimum, sum hevur sagt tað nakrar ferðir er stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg. Við Heimabeitið í Útvarpinum týsdagin segði hann, at hann tekur synd í handilslívinum í Klaksvík, um handilsmiðstøðin ikki verður veruleiki.

– Gongdin í Danmark vísir, at vøksturin í handilslívinum liggur í miðstøðunum og ikki hjá handlunum, sum liggja uttanfyri, og tað er eitt greitt tekin um, at fólk vilja hava handilsmiðstøð, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

Útfyllingin við Sandin er um at vera liðug nú, men verkætlanin við handilsmiðstøðini er ikki komin serliga langan veg. Uppruna ætlanin var so bjartskygd sum, at handilsmiðstøðin skuldi standa liðug, tá undirsjóvartunnilin verður liðugur á sumri í 2006, men tað verður so av ongum. Og enn er ætlanin um handilsmiðstøðina ikki eingongd vorðin veruleiki, men arbeitt verður tó kortini við henni.

Kanska meira fæst at vita um ætlanina, tá hesin mánaðurin er komin at enda. Livst so spyrst.

## Klaksvíkar kommuna stuðlar

**Minnilutin í Klaksvíkar býráð hevur skotið upp, at kommunan letur stuðul til Reyða Kross**

NEYÐHJÁLP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Uppskotið frá minnilutanum er, at Klaksvíkar kommuna letur 20 krónur pr. íbúgva til Reyða Kross.

Hetta uppskotið fer Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, at leggja fyri býráðið á komandi býráðsfundi, sum verður týsdagin í komandi viku.

20 krónur pr. íbúgva í Klaksvík gevur umleið 100.000 krónur. Borgarstjórin ivast eitt sindur í, um tað verður so nógv, men hann fer so at leggja uppskotið fyri býráðið. Sjálvur heldur hann, at 100.000 krónur er øgiliga nógvir pengar fyri kommununa, so kanska 50.000 hevði verið meira passandi.

Men hetta verður sum sagt tikið upp á býráðsfundi í næstu viku.

# Býráðið bíðar eftir nýggjum uppskoti

**Samráðingar hava verið millum Klaksvíkar kommunu og stigtakararnar til handilsmiðstøðina. Stigtakararnir ynskja at broyta ætlanina nakað, og nú bíðar býráðið bara eftir nýggja útkastinum hjá teimum**

HANDILSMIÐSTØÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, fegnast um, at arbeiðið við handilsmiðstøðini við Sandin nú er uppafturtikið. Onki alternativ er til, hvat kann vera á økinum, um ætlanin við handilsmiðstøðini dettur niðurfyri*

**Klaksvík:**
Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, fegnast um, at arbeiðið við ætlanini at gera eina handilsmiðstøð í býnum, nú er tikið uppaftur. Hann váttar, at fundir hava verið millum stigtakararnar og kommununa um møguligar broytingar av verkætlanini.

– Fyrireikararnir ynskja at broyta verkætlanina nakað, og tað hava teir eisini fingið eitt ávíst frælsi til, sigur borgarstjórin.

Hann hevur í einum skrivi til stigtakararnar sagt, at kommunan ynskir at fáa eitt nýtt útkast á borðið um einar tríggjar til fýra mánaðir. Hetta útkastið verður so lagt fyri býráðið at samtykkja. Klaksvíkar kommuna skal samtykkja ætlanina, tí tað fyriliggur ein byggisamtykt fyri miðbýarætlanini.

– Eg kann veruliga ikki siga so nógv um hesa ætlanina – serliga nú tað fara at koma broytingar. Nú er spurningurin bara, hvat stigtakararnir koma aftur við, tá vænti eg, at tað ber betur til at siga nakað meira ítøkiligt um ætlanina við handilsmiðstøðini, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

### Onki alternativ

Útfyllingin við Sandin gongur framvegis við rúkandi ferð. Arbeiðið við at leggja næsta lagið oman yvir er líka við at vera liðugt. Tað eru mong í Klaksvík, sum halda, at útfyllingin er ræðulig fyri býin, og at hon skemmar víkina. Men tað broytir so ikki tað fakta, at hon er komin, og at hon skal nýtast til okkurt. Allatíðina hevur ætlanin verið, at tað skal vera ein handilsmiðstøð, og tað gongur spakuliga tann vegin.

*Men um nú hendan ætlanin dettur niðurfyri, hava tit so nakað alternativ?*

– Nei, tað hava vit ikki, so um hendan ætlanin dettur niðurfyri, og tað vóni eg ikki, at hon ger, so er ikki nógv annað at gera enn at vóna, at onkur annar bankar upp á við einari ætlan, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Hann leggur afturat, at tað eru aðrir fyrispurningar komnir inn um útfyllingina og ætlanina við handilsmiðstøðini, men hann heldur ikki, at talan er um so ítøkiligar fyrispurningar.

Sostatt er ætlanin við handilsmiðstøðini alt avgerandi fyri, um nakað verður á útfyllingini við Sandin ella ikki. Tað er bara tann ætlanin, sum er ígongdi. Um hon dettur niðurfyri, er sum nú er, onki alternativ.

## Skálaberg siglir heim

**Klaksvík:**
Nýggi trolarin hjá JFK Trol í Klaksvík, Skálaberg, er nú farin at sigla heim. Teir hava fiskað í Barentshavinum síðani einaferð fyrst í oktober mánaði, so hesin túrurin hevur vart tríggjar mánaðir.

Skálaberg hevur hendan túrin fiskað tilsamans 770 tons. Ein partur av veiðuni varð lagdur upp í Noregi.

Væntandi verður Skálaberg á Klaksvík fríggjadagin um middagsleitið.

**- sae -**